























# Einar Mikkelsen

18. mai 1949 byrjaði Einar Mikkelsen sum sjálvstøðugur el-innleggjari og í 1955 lat handilin upp. Einar byrjaði sítt el-virki í 1949, og nakrar av stóru uppgávunum hava verið t.d. el-innlegging til Kommunuskúlan í Tróndargøtu, Snikkaravirkið í J.Patursonargøtu, Landssjúkarahúsið, Marinustøðina við Hoyvíksvegin, El-verkið á Sundi, Ellisheimið, Skúlaheimið við Marknagilsvegin, Havnar Klubba, Ítrottarhøllina á Nabb, umbygging av støðini í Mjørkadali, Skúlan á Trøðni, umbygging á Føroya Studentaskúla og ikki minst el-arbeiðið í sambandi við nýggja ljósskipan og aðrar tryggdarskipanir tá ið lendingarbreytin í Vága Floghavn bleiv nútímansgjørd og longd frá 1100 til 1250 metrar í 1978-80. Annars hevur fyritøkan gjørt eitt ótal av el-innleggingum í virkjum og sethúsum, bæði í Havn og á bygd.

Í 1955 lat Einar upp tann fyrsta handilin í Føroyum, sum burtur av seldi lampur. Í 1980 fekk virkið limaskap í størstu lampuketuni í Danmark, Elkøb, sum nú eitur Elbodan.

Í 1980 var ættarliðsskifti í fyritøkuni, tá sonurin Høgni B. Mikkelsen tók við sum stjóri, og rekur hann í dag virkið saman við konuni Sonju, sum eisini kemur frá einum heimi, har foreldrini Jeanne og Holger Jensen róku sína egnu fyritøku: Holger Jensens Møbilhandil í N. Finsensgøtu í Havn.

| | |
|---|---|
| Fyritøka: | Einar Mikkelsen Sp/f |
| Adressa: | Bøgøta 12 |
| Býur/Bygd: | Tórshavn |
| Tel: | 312211 |
| Teldupostur: | el-mikk@olivant.fo |
| Heimasíða: | einar-mikkelsen.fo |
| Stjóri/eigari: | Høgni Mikkelsen |
| Vøruúrval/merkir: | Lampur av nógvum ymiskum merkjum |
| Upplatingartíðir: | |
| Mánadag | kl. 9.00 - 17.30 |
| Týsdag | kl. 9.00 - 17.30 |
| Mikudag | kl. 9.00 - 17.30 |
| Hósdag | kl. 9.00 - 18.00 |
| Fríggjadag | kl. 9.00 - 18.00 |
| Leygardag: | kl. 9.00 - 14.00 |
| Sett á stovn: | 1949 |